NORÐOYA SPARIKASSI

HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2011

# HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2011

HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2011

NORÐOYA SPARIKASSI

Høvuðsdeildin:
Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. +298 475000
Fax +298 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

Deildin í Saltangará:
Heiðavegur 21
FO-600 Saltangará
Tel. +298 475000
Fax +298 476012

Deildin í Tórshavn:
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 475000
Fax +298 476015

HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2011 HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2011 HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2011

# UM SPARIKASSAN

Sparikassin
er sjálveigandi stovnur. Hvørki stovnarar ella onnur eru ánarar av peningaogn ella avlopi sparikassans.

Avlop sparikassans
verður - burtursæð frá tí, sum verður nýtt til vælgerandi og almenngagnlig endamál – lagt afturat eginpeningi sparikassans, alt til tryggjan av sparipeninginum.

Í sparikassanum
eru tygum altíð vælkomin, og starvsfólkið her er til reiðar at geva tygum leiðbeiningar og upplýsingar í fíggjarspurningum.

# INNIHALDSYVIRLIT


| | | |
|---|---|---|
| LEIÐSLUÁTEKNING | s. | 6 |
| HÁLVÁRSFRÁGREIÐING | s. | 7 |
| RAKSTRARROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR | s. | 9 |
| FÍGGJARSTØÐA HIN 30. JUNI | s. | 10 |
| ÚTGREINING AV EGINPENINGI | s. | 11 |
| LYKLA- OG HØVUÐSTØL | s. | 12 |
| NOTUR | s. | 13 |

# LEIÐSLUÁTEKNING

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðtikið hálvársfrásøgn fyri 1. hálvár 2011 fyri Norðoya Sparikassa. Hálvársfrásøgnin er greidd samsvarandi lóg um fíggjarligt virksemi, umframt kunngerð frá Fíggjareftirlitinum um framløgu av roknskapi fyri peningastovnar.

Tað er okkara fatan, at hálvársfrásøgnin gevur eina rættvísa mynd av stovnsins ognum, skyldum og fíggjarstøðu pr. 30. juni og úrslitinum fyri 1. hálvár 2011.

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað.

Klaksvík, hin 17. august 2011.

Stjórn

Marner Mortensen

Nevnd

| | | |
|---|---|---|
| John P. Danielsen<br>formaður | Jóannes Hansen<br>*næstformaður* | Erling Petersen |
| Jóhanna á Tjaldrafløtti | Kristian Martin Rasmussen | Karl Heri Joensen |
| Julianna Thomsen | Eyðun Nolsøe | Guðrið Lava Olsen |



# HÁLVÁRSFRÁGREIÐING

Úrslitið hjá Norðoya Sparikassa fyrra hálvár 2011 var eftir skatt eitt avlop uppá 3,5 mió.kr. sammett við eitt hall uppá 8,1 mió.kr. fyri sama tíðarskeið í undanfarna ári. Avlopið stavar í høvuðsheitinum frá lægri rakstrarkostnaði og lægri niðurskrivingum upp á útlán. Sparikassin er ikki nøgdur við úrslitið, men fegnast kortini um avlop aftaná trý ár við halli.

## RAKSTRARROKNSKAPURIN

### Netto rentu- og kostnaðarinntøkur

Netto rentu- og kostnaðar inntøkur minkaðu úr 37,3 niður í 35,0 mio.kr., sum svarar til eina afturgongd uppá 2,3 mió.kr. Her skal havast í huga, at sparikassin 1. hálvár 2010 tók lán við statsveðhaldi til at tryggja gjaldførið. Gott gjaldføri tyngir eisini nettorentuna, um tað ikki er møguleiki fyri nøktandi avkasti. Tí hevur sparikassin í juni mánað 2011 afturrindað 200 mió.kr. av teimum 650 mió. kr., sum lánið við statsveðhaldi var.

### Virðisjavnan

Virðisjavnan vísir ein vinning uppá 3,2 mió.kr. 1. hálvár 2011. Hetta er á leið tað sama sum fyri 1. hálvár 2010.

Goymsla sparikassans av lánsbrøvum við endan av 1. hálvári 2011 vísir 309 mió.kr.

### Útreiðslur til starvsfólk og umsiting

Útreiðslur til starvsfólk og umsiting eru lækkaðar úr 32,8 niður í 25,7 mió.kr., sum er ein lækking uppá 7,1 mió.kr. Fyrra hálvár 2010 var hesin postur nógv merktur av ymiskum eykaútreiðslum, men nú er hann komin niður á sama støði sum í 2007.

### Útreiðslur til Bankapakka 1 og Indskydergarantifonden

Ótrygga støðan í fíggjarheiminum hevur síðstu árini borið serligar útreiðslur við sær.

Í 2010 var útreiðslan til Bankapakka 1 3,2 mió.kr., tí statsveðhaldið fyri øll innlán datt burtur 1. oktober 2010.

Fyrra hálvár 2011 vórðu rindaðar 1,5 mió. kr. til Indskydergarantifonden. Hetta er parturin hjá Norðoya Sparikassa í sambandi við, at Amagerbanken og Fjordbank Mors fóru undir Fíggjarligt Støðufesti.

### Niðurskrivingar

Fyrra hálvár 2011 niðurskrivaði sparikassin útlán og ábyrgdir uppá 4,8 mió.kr., móti 12,9 mió.kr. sama tíðarskeið í 2010. Hetta er ein minking í niðurskrivingum uppá 8,1 mió.kr.

## FÍGGJARSTØÐA

Fíggjarstøða sparikassans minkaði 264 mió.kr. í 1. hálvári 2011, frá 2.493 mió.kr. til 2.229 mió.kr. svarandi til eina minking uppá 10,6%.

Hetta stavar í størsta mun frá, at sparikassin hevur afturrinda lán við 200 mió.kr. Samstundis eru innlán í 1. hálvári 2011 minkað við 58 mió.kr. frá 1.581 mió.kr. ultimo 2010 til 1.522 mió.kr. ultimo 1. hálvár 2011. Hetta er ein minking uppá 3,7%. Útlán eru minkað við 31 mió.kr. í 1. hálvári 2011 frá 1.702 mió.kr. ultimo 2010 til 1.671 mió.kr. Tað er ein minking uppá 1,8%.

### Gjaldføri

Gjaldførið hjá sparikassanum er gott. Eftir fyrra hálvár í ár var yvirdekningurin í mun til lógarkravið 125,5% móti 257,8% eftir 1. hálvár 2010. Sum áður nevnt hevur sparikassin 1. hálvár 2011 niðurgoldið lán við 200 mió.kr. Ætlanin er í 2012 at niðurgjalda lán við 200 mió.kr.

## Solvensur og eginpeningur

Solvensurin hjá sparikassanum er góður. Eftir fyrra hálvár í ár var solvensurin 16,1% í mun til 17,4% somu tíð í fjør. Hetta er ein minking uppá 1,3%. Orsøkin til minkingina er, at hallið í 2010 tærdi nakað uppá solvensin.

Individuelli solvenstørvur sparikassans var pr. 1. hálvár uppgjørdur til 11,7%.

## Meting um 2011

Verður sæð burtur frá niðurskrivingum fyri 1. hálvár 2011 gjørdist avlopið 9,0 mió.kr., móti 3,1 mió. kr. fyri sama tíðarskeið í 2010 – hetta er ein framgongd uppá 5,9 mió.kr.

Fyri alt árið 2011 væntar sparikassin eitt avlop áðrenn niðurskrivingar uppá 10-20 mió.kr. Tað slepst ikki undan niðurskrivingum komandi árini, men niðurskrivingarnar verða á einum lægri støði, enn tær hava verið undanfarnu trý árini.

## Váðar og váðastýring

Ongar broytingar eru í váða og váðastýring sparikassans. Víst verður tí til frágreiðingina í ársfrágreiðingini fyri 2010.

## Hendingar eftir roknskapartíðarskeiðið

Eftir at roknskapartíðarskeiðið endaði 30.06.2011 eru ikki farnar fram týðandi hendingar, sum hava ávirkan á fíggjarligu gongd sparikassans.

## Óvissur við innrokning og máting

Tær mest týðandi óvissurnar við innrokning og máting eru knýttar at virðisáseting av ognum og niðurskrivingum av útlánum og áogn. Leiðslan metir, at óvissurnar eru á einum støði, sum er nøktandi í mun til hálvársfrásøgnina.

## Nýttur roknskaparháttur

Sparikassin hevur ongar broytingar gjørt í nýttum roknskaparhátti. Víst verður til ársfrásøgnina fyri 2010.

# RAKSTRARROKNSKAPUR 1. HALVÁR

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur | 59.068 | 61.906 |
| 2 | Rentuútreiðslur | 26.628 | 25.865 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **32.440** | **36.041** |
| | | | |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 46 | 0 |
| 3 | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 2.872 | 1.966 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisjón | 383 | 714 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **34.975** | **37.293** |
| | | | |
| 4 | Virðisjavnan av lánsbrøvum, partabrøvum, gjaldoyra o.ø. | 3.178 | 3.214 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 178 | 489 |
| 5 | Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | 25.726 | 32.806 |
| | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 2.047 | 2.007 |
| | Útreiðslur til Bankapakka I og Indskydergarantifonden | 1.471 | 3.157 |
| 6 | Niðurskrivingar uppá útlán o.a. | 4.839 | 12.874 |
| | Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum | 0 | 0 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **4.248** | **-9.848** |
| | | | |
| | Skattur | 765 | -1.773 |
| | **Hálvársúrslit** | **3.483** | **-8.075** |

## FÍGGJARSTØÐA HIN 30. JUNI

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK | Ársendi 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | | |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 106.325 | 76.304 | 311.763 |
| | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 23.283 | 764.572 | 36.653 |
| | Útlán til amortiserað kostvirði | 1.671.468 | 1.780.855 | 1.702.258 |
| 7 | Lánsbrøv til dagsvirði | 85.035 | 0 | 74.959 |
| 7 | Lánsbrøv til amortiseraðan kostprís | 244.198 | 0 | 246.149 |
| | Partabrøv o.a. | 11.153 | 43.118 | 30.988 |
| | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 1.008 | 987 | 1.008 |
| | Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 0 | 1.085 | 0 |
| | Fastognir íalt | 38.951 | 41.453 | 38.742 |
| | Íløguognir | 17.454 | 19.644 | 17.069 |
| | Fastognir til egna nýtslu | 21.497 | 21.809 | 21.673 |
| | Aðrar materiellar ognir | 13.044 | 16.758 | 14.915 |
| | Útsett skattaágogn | 15.450 | 17.975 | 16.202 |
| | Yvirtiknar ognir | 12.615 | 11.201 | 13.771 |
| | Aðrar ognir | 6.916 | 1.896 | 5.668 |
| | Tíðaravmarkað ogn | 0 | 595 | 0 |
| | **Ogn tilsamans** | **2.229.446** | **2.756.799** | **2.493.076** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur** | | | |
| | **Skuld** | | | |
| | Skuld til peningastovnar | 7 | 65.145 | 76 |
| | Innlán | 1.522.481 | 1.727.583 | 1.580.707 |
| | Útgivin lánsbrøv til amortiseraðan kostprís | 449.730 | 649.415 | 649.513 |
| | Onnur skuld | 18.086 | 23.539 | 14.820 |
| | Tíðaravmarkað skuld | 146 | 143 | 126 |
| | **Skuld tilsamans** | **1.990.450** | **2.465.825** | **2.245.242** |
| | | | | |
| | **Avsetingar** | | | |
| | Avsetingar til eftirløn o.a. | 2.474 | 2.548 | 2.474 |
| | Avsetingar til tap uppá ábyrgdir | 95 | 2.994 | 13.328 |
| | Aðrar avsetingar | 264 | 5.801 | 0 |
| | **Avsetingar tilsamans** | **2.833** | **11.343** | **15.802** |
| | | | | |
| | **Eftirstillað kapitalinnskot** | **50.234** | **49.814** | **50.094** |
| | | | | |
| | **Eginpeningur** | | | |
| | Ábyrgdarpeningur | 7.143 | 6.604 | 6.635 |
| | Gávugrunnur | 0 | 0 | 0 |
| | Uppskrivingargrunnur | 0 | 0 | 0 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 175.303 | 231.288 | 231.288 |
| | Hálvársúrslit eftir skatt | 3.483 | -8.075 | -55.985 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **185.929** | **229.817** | **181.938** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **2.229.446** | **2.756.799** | **2.493.076** |
| | | | | |
| 8 | Aðrar skyldur | | | |



## ÚTGREINING AV EGINPENINGI

| | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK | Ársendi 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| **Kapitalflytingar** | | | |
| Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 6.635 | 6.763 | 6.763 |
| Tilgongd í árinum | 508 | 0 | 0 |
| Frágongd í árinum | 0 | 159 | 128 |
| **Ábyrgdarpeningur í hálvárinum / við ársenda** | **7.143** | **6.604** | **6.635** |
| | | | |
| Flutt avlop við ársbyrjan | 175.303 | 231.288 | 231.288 |
| Broyting primo | 0 | 0 | 0 |
| Flutt frá gávugrunni, netto | 0 | 0 | 0 |
| Afturførdar uppskrivingar | 0 | 0 | 0 |
| Flutt frá ársúrsliti | 3.483 | -8.075 | -55.985 |
| **Flutt avlop í hálvárinum / við ársenda** | **178.786** | **223.213** | **175.303** |
| | | | |
| **Eginpeningur tilsamans** | **185.929** | **229.817** | **181.938** |
| | | | |
| **Kapital- og solvensuppgerð** | | | |
| Eginpeningur | 182.446 | 229.817 | 181.938 |
| Útsett skattaágogn | -15.450 | -17.975 | -16.202 |
| Hybridur kjarnukapitalur | 50.234 | 49.814 | 50.094 |
| **Kjarnukapitalur, aftaná frádrøg** | **217.230** | **261.656** | **215.830** |
| | | | |
| Eginpeningur | 182.446 | 229.817 | 181.938 |
| Útsett skattaágogn | -15.450 | -17.975 | -16.202 |
| Hybridur kjarnukapitalur | 50.234 | 49.814 | 50.094 |
| **Basiskapitalur áðrenn frádrøg** | **217.230** | **261.656** | **215.830** |
| | | | |
| **Vektaði tøl íalt** | **1.351.848** | **1.505.631** | **1.296.195** |
| | | | |
| **Solvensprosent** | **16,1** | **17,4** | **15,2** |
| **Kjarnukapitalprosent** | **16,1** | **17,4** | **15,2** |

# LYKLA- OG HØVUÐSTØL

| Lyklatøl | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 16,1 | 17,4 | 15,1 | 17,4 | 17,0 |
| Kjarnukapitalprosent | 16,1 | 17,4 | 15,1 | 17,4 | 17,0 |
| Hálvársrenting av eginpeningi áðrenn skatt | 2,31 | -4,2 | -5,3 | -0,4 | 6,3 |
| Hálvársrenting av eginpeningi aftaná skatt | 1,89 | -3,5 | -4,4 | -0,3 | 5,2 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,12 | 0,81 | 0,72 | 0,97 | 1,79 |
| Rentuváði | 2,5 | 4,8 | 0,5 | 1,3 | 1,1 |
| Gjaldoyrastøða | 0,3 | 0,2 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og niðurskrivingar í mun til innlán | 114,3 | 107,0 | 94,2 | 112,8 | 117,1 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 125,5 | 257,8 | 125,2 | 51,7 | 20,4 |
| Stórir kundar tilsamans í mun til eginpening | 88,4 | 85,3 | 93,1 | 57,4 | 57,2 |
| Akkumulerað niðurskrivingarprosent | 3,9 | 3,9 | 2,5 | 1,3 | 1,1 |
| Taps- og niðuskrivingarprosent í hálvárinum | 0,3 | 0,6 | 0,9 | 0,3 | 0,0 |
| Útlánsvøkstur í hálvárinum | -1,8 | -3,1 | 3,1 | 1,1 | 12,4 |
| Útlán í mun til eginpening | 9,0 | 7,7 | 7,4 | 5,5 | 5,2 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 34.975 | 37.293 | 32.104 | 38.556 | 42.569 |
| Virðisjavnan | 3.178 | 3.214 | 502 | -5.435 | 3.057 |
| Úrslit av kapitaláhugamálum | 0 | 0 | 0 | -499 | 0 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 178 | 489 | 802 | 391 | 211 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **38.331** | **40.996** | **33.408** | **33.013** | **45.837** |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 25.726 | 35.963 | 27.531 | 26.320 | 25.558 |
| Útreiðslur til Bankapakka I | | | | | |
| og Indskydergarantifonden | 1.471 | 3.157 | 0 | 0 | 0 |
| Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum | 2.047 | 2.007 | 1.633 | 1.924 | 1.381 |
| Niðurskrivingar uppá útlán | 4.839 | 12.874 | 17.165 | 6.700 | -1.276 |
| **Hálvársúrslit áðrenn skatt** | **4.248** | **-9.848** | **-12.921** | **-1.931** | **20.174** |
| | | | | | |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Útlán | 1.671.468 | 1.780.855 | 1.915.649 | 1.837.567 | 1.690.575 |
| Virðisbrøv | 340.387 | 43.118 | 142.800 | 251.980 | 149.085 |
| Innlán | 1.522.481 | 1.727.583 | 2.082.667 | 1.660.994 | 1.461.588 |
| Útgivin lánsbrøv | 449.730 | 649.513 | 0 | 0 | 0 |
| Javni | 2.229.446 | 2.756.799 | 2.454.011 | 2.249.445 | 1.966.696 |
| Eginpeningur | 185.929 | 229.817 | 264.261 | 325.489 | 326.794 |

*Samanberingartøl fyri árini 2007 til 2008 eru ikki tillagað broytingum í nýttum roknskaparhátti.*

# NOTUR

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | 1.338 | 287 |
| | Útlan | 55.329 | 58.566 |
| | Lánsbrøv | 2.390 | 3.053 |
| | Fíggjarlig amboð | 5 | 0 |
| | Aðrar rentuinntøkur | 6 | 0 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **59.068** | **61.906** |
| | | | |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Innistandandi hjá peningastovnum | 110 | 691 |
| | Innlán | 14.498 | 21.470 |
| | Útgivin lánsbrøv í samband við Bankapakka II | 8.100 | 0 |
| | Eftirstillað kapitalinnskot í sambandi við Bankapakka II | 2.785 | 2.715 |
| | Ábyrgdarpeningur | 199 | 100 |
| | Aðrar rentuútreiðslur | 936 | 889 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **26.628** | **25.865** |
| | | | |
| 3 | **Kostnaðar- og provisjónsinntøkur** | | |
| | Virðisbrøv og goymsla | 41 | 62 |
| | Gjaldstænastur | 899 | 591 |
| | Lánissakskostnaður | 574 | 70 |
| | Provisjón av ábyrgdum | 336 | 511 |
| | Aðrar kostnaðar- og provisjónsinntøkur | 1.022 | 732 |
| | **Kostnaðar- og provisjónsinntøkur tilsamans** | **2.872** | **1.966** |
| | | | |
| 4 | **Virðisjavnan** | | |
| | Lánsbrøv | -7 | 2.160 |
| | Partabrøv | 4.111 | 1.148 |
| | Gjaldoyra | -9 | -94 |
| | Fíggjarlig amboð | -916 | 0 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **3.179** | **3.214** |
| | | | |
| 5 | **Útreiðslur til starvsfólk og umsiting** | | |
| | **Løn og samsýnig til umboðsráð, nevnd og stjórn** | | |
| | Stjórn | 948 | 3.486 |
| | Nevnd | 300 | 300 |
| | Umboðsráð | 80 | 155 |
| | **Tilsamans** | **1.293** | **3.941** |
| | | | |
| | **Útreiðslur til starvsfólk til starvsfólk og fyrisiting** | | |
| | Lønir og samsýningar | 9.867 | 8.652 |
| | Eftirløn | 1.361 | 1.665 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd og avgjøld v.m. | 1.624 | 1.672 |
| | **Tilsamans** | **12.887** | **11.989** |
| | | | |
| | Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 11.546 | 16.876 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk og umsiting tilsamans** | **25.726** | **32.806** |
| | | | |
| | Miðaltal av starvsfólkum | 44,6 | 45,3 |

| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK | Ársendi 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| 6 | **Niðurskrivingar uppá útlán v.m. §107** | | | |
| | **Individuellar niðurskrivingar** | | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar uppá útlán við ársbyrjan | 90.094 | 56.464 | 56.464 |
| | Niðurskrivingar uppá útlán í árinum | 15.593 | 11.721 | 58.463 |
| | Afturførdar niðurskrivingar | -11.355 | -1.002 | -3.160 |
| | Avskrivað (staðfest tap) | -30.294 | -3.510 | -21.673 |
| | **Akkumuleraðar individuellar niðurskrivingar tilsamans** | **64.039** | **63.673** | **90.094** |
| | Niðuskrivað útlán í alt, áðrenn niðurskrivingar | 213.391 | 190.609 | 287.864 |
| | Individuellar niðurskrivingar í alt | 64.134 | 63.673 | 90.094 |
| | **Niðuskrivað útlán í alt, eftir niðurskrivingar** | **149.257** | **126.936** | **197.770** |
| | **Bólkaðar niðurskrivingar** | | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar uppá útlán við ársbyrjan | 3.046 | 2.396 | 2.396 |
| | Niðurskrivingar uppá útlán í hálvárinum | 2.854 | 1.959 | 937 |
| | Afturførdar niðurskrivingar í árinum | -1.224 | -667 | -287 |
| | **Akkumuleraðar bólkaðar niðurskrivingar uppá útlán ultimo** | **4.676** | **3.688** | **3.046** |
| | Niðuskrivað útlán í alt, áðrenn niðurskrivingar | 1.567.475 | 1.790.907 | 2.082.199 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar í alt | 4.676 | 3.688 | 3.046 |
| | **Niðuskrivað útlán í alt, eftir niðurskrivingar** | **1.562.799** | **1.787.219** | **2.079.153** |
| | **Niðurskrivingar tilsamans** | **68.715** | **67.362** | **93.140** |
| | **Individuellar burturleggingar uppá ábyrgdir** | | | |
| | Akkumuleraðar burturleggingar uppá ábyrgdir við ársbyrjan | 695 | 1.396 | 1.396 |
| | Burturleggingar í hálvárinum | 0 | 1.598 | 0 |
| | Afturførdar burturleggingar | -600 | 0 | -701 |
| | Avskrivingar (staðfest tap) | 0 | 0 | 0 |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar tilsamans** | **95** | **2.994** | **695** |
| | **Burturleggingar uppá Det Private Beredskab og Amagerbanken** | | | |
| | Akkumuleraðar burturleggingar við ársbyrjan | 12.634 | 5.535 | 5.535 |
| | Burturleggingar í hálvárinum | 0 | 0 | 7.099 |
| | Afturførdar burturleggingar | 0 | 0 | 0 |
| | Avskrivingar (staðfest tap) | -12.634 | 0 | 0 |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar tilsamans** | **0** | **5.535** | **12.634** |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar tilsamans** | **95** | **6.931** | **13.329** |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar tilsamans** | **68.809** | **74.293** | **106.469** |





| Nota | | 2011<br>1.000 DKK | 2010<br>1.000 DKK | Ársendi 2010<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| 6 | Niðurskrivingar uppá útlán (framhald) | | | |
| | **Samanseting til rakstrarroknskapin** | | | |
| | Individuellar niðurskrivingar uppá útlán netto | 4.238 | 10.719 | 42.776 |
| | Individuellar burturleggingar uppá ábyrgdir netto | -600 | 0 | -701 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar netto | 1.630 | 1.292 | 649 |
| | Burturleggingar uppá Det Private Beredskab og Amagerbanken | 0 | 0 | 7.099 |
| | Renta av niðuskrivaðum parti av lánum | -2.493 | 0 | -6.516 |
| | Staðfest tap í árinum, ið ikki áður eru niðurskrivaði | 863 | 973 | 2.429 |
| | Inngoldið til áður avskrivaði krøv | -86 | -154 | -154 |
| | Niðurskrivingar av yvirtiknum ognum | 1.287 | 0 | 3.724 |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar til rakstrarroknskapin í hálvárinum** | **4.839** | **12.830** | **49.306** |
| 7 | **Lánsbrøv** | | | |
| | Skrásett á keypsskálum - dagvirði | 85.035 | 0 | 74.959 |
| | Skrásett á keypsskálum - amortiserað kostprís | 244.198 | 0 | 246.149 |
| | **Lánsbrøv tilsamans** | **329.233** | **0** | **321.108** |
| | Munur á amortiseraðum kostprísi og dagsvirði | -1.881 | 0 | -222 |
| | **Lánsbrøv til dagsvirði tilsamans** | **327.352** | **0** | **320.886** |
| 8 | **Aðrar skyldur** | | | |
| | **Ábyrgdir** | | | |
| | Fíggjarábyrgdir | 7.389 | 4.652 | 7.441 |
| | Aðrar skyldur | 33.199 | 38.852 | 28.365 |
| | **Ábyrgdir og aðrar skyldur tilsamans** | **40.588** | **43.504** | **35.806** |

HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2011 HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2011 HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2011

www.ns.fo